**Uppskot til**

# Kunngerð
# um
# ferðing hjá súkklum á gongubreytum

Við heimild í § 29, stk. 4 í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu verður ásett:

*Myndugleikar*

**§ 1.** Har súkklubreyt ikki longu er gjørd framvið almennum vegi, kann løgreglan við loyvi frá viðkomandi vegamyndugleika, sum fyribils fyriskipan áseta, at súkklandi skulu nýta gongubreytir, um so er, at treytirnar sambært §§ 2-4 eru loknar.

*Vegviðurskifti og ferðsluviðurskifti*

**§ 2.** Vegviðurskifti og ferðsluviðurskiftini skulu vera soleiðis háttað, at tað er vandamikið at súkkla á akbreytini.
*Stk. 2.* Áðrenn sundurbýtið, skal gongubreytin í minsta lagi vera 2,5 m til breiddar.
*Stk. 3.* Tann parturin av gongubreytini, ið framhaldandi er ætlaður fólki til gongu, skal í minsta lagi vera 1 m til breiddar og altíð so mikið breiður, at tey súkklandi ikki eru til óneyðugan ampa fyri fólki til gongu.
*Stk. 4.* Á støðum, har sum útgongdir, útkoyringar, rampar og tílíkt eru beint við gongubreytina, kann henda skipan bert verða framd, um tann parturin, ið er ætlaður súkklandi, og tann parturin, ið er ætlaður gangandi, hvør er so breiður, at tað ikki elvir til vanda ella munandi ampa.
*Stk. 5.* Súkklað skal vera sama rætning sum ferðslan á akbreytini.
*Stk. 6.* Í fjølbygdum øki er ikki loyvt prutlum at nýta gongubreyt ella deilda gongubreyt og súkklubreyt.

*Merking*

**§ 3.** Tað skal vera merkt týðiliga upp millum tann partin av gongubreytini, ið er ætlaður súkklandi, og tann partin, ið framhaldandi er ætlaður gangandi.
*Stk. 2.* Merkingin skal verða gjørd við longdaravmerking og boðsskelti.
*Stk. 3.* Longdaravmerking skal verða gjørd sambært galdandi kunngerð um ferðslumerkingar.
*Stk. 4.* Tað skal skeltast við boðsskelti deild breyt, og kann merkjast súkklutekin, sambært galdandi kunngerð um ferðslumerkingar.

*Skiftisreglur*

**§ 4.** Boð um súkkling á gongubreyt, er bert at meta sum ein fyribils skipan og tað áliggur vegamyndugleikanum at skipa fyri, at kravda merkingin millum tann partin av gongubreytini, ið er ætlaður súkklandi, og tann partin, ið framhaldandi er ætlaður gangandi, sæst við at munur er á álegging ella við vegjaðara, kantsteinum ella tílíkum.
*Stk. 2.* Í sambandi við nýgerð og størri broytingar av vegakervum, eftir at henda kunngerð er komin í gildi, skulu teir til eina og hvørja tíð galdandi veganormar fyri gerð av súkklubreytum verða fylgdir.

*Gildiskoma*

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, xx. juni 2015

**Johan Dahl**
landsstýrismaður

/ Bjørgfríð Ludvig